# Viðmerking:

# Mannarættindi og heimspekiligar avbjóðingar

fróðskapur
Faroe University Press
Fróðskaparrit 70 (2024), nr. 2: 178-188
Human Rights and the Faroe Islands
©The Author(s) 2024 Open Access under Creative Commons by Attribution License. Use, distribution and reproduction are unrestricted. Authors and original publication must be credited.
www.frodskapur.fo/

## Commentary essay: Human rights and philosophical challenges

**Jógvan D. Hansen**[1]

### Abstract

The idea that humans have certain fundamental rights goes far back in the history of philosophy. However, the justifications for these rights have been quite diverse. The question has also been raised as to whether these rights are inherent or should be considered as agreements among people. It cannot be said that there is any final consensus on this issue. At the same time, it is an established fact that the concept of human rights plays an important role both in domestic and international legal understanding. Th article considers some of these issues.

### Úrtak

Hugsanin um, at menniskjað hevur nøkur grundleggjandi rættini, gongur langt aftur í heimspekisøguna. Men grundgevingarnar fyri hesum rættindum hava verið rættiliga ymiskar. Spurningur hevur eisini verið settur við, um hesi rættindi eru íborin ella at meta sum samtykt manna millum. Ikki kann sigast, at nøkur endalig semja er um henda spurning. Men samstundis er tað ein royndur lutur, at mannarættindahugtakið hevur ein týðandi leiklut bæði í heimligari og altjóða rættarfatan. Greinin lýsir nøkur av hesum viðurskiftum.

**Keywords:** Philosophy, ideology, human rights, natural law.
**Leitorð**: Heimspeki, hugmyndasøga, mannarættindi, náttúrurættur.

[1] Námslektari, Søgu- og samfelagsdeildin, Jónas Broncksgøta 25, Tórshavn Fróðskaparsetur Føroya, jogvand@setur.fo.

## Søguligt baksýni

Hugsanin, at menniskjan hevur íborin rættindi, hevur røtur langt aftur í hugmyndasøguna. Eitt dømi eru sonevndu stoikararnir (Pigliucci, 2024). Hóast ymiskir, so høvdu teir eina kosmopolitiska grundfatan, og legði hon ikki minst dent á skilvísi. Í einum skilvísum heimssamfelagi vóru rættindini hjá tí einstaka ikki treytað av ytri viðurskiftum so sum uppruna, kyni, sosialari støðu v.m. Tað var við at vera ein partur av mannaættini, at ein kundi sigast at hava rættindi. Ella við øðrum orðum: Tað at vera menniskja *var* at hava rættindi. Á enskum verður hetta stundum nevnt "the inherence doctrine".

Fara vit so upp í miðøld, er tað serliga Thomas Aquinas (1225-1274), ið er áhugaverdur (Brown, 2024). Við avgerandi íblástri frá Aristoteles ( 384 f.Kr – 322 f. Kr.) orðar hann eina náttúrurættarlæru á kristnari grund (Humpreys, 2024). Og tað, ið gevur menniskjuni serliga tign, er at hon er skapt í Guds mynd. Til ber at siga, at allur rættur hevur sín uppruna í einum gudsgivnum náttúru-rætti.

Men í endurreisnini (renessansuni) kemur vend í. Spurningur verður settur við, um Gud, tá ið saman um kemur, blandar seg upp í heimsins gongd. Í staðin koma hugsanir um skynsemi at spæla høvuðsleiklutin. Ein tann fremsti talsmaðurin fyri tí sonevnda *rationalistiska* náttúrurættinum er hálendski løgfrøðingurin og rættarheimspekingurin Hugo Grotius (1583 – 1645)(Miller, 2021). Hesin viðger m.a. rættarhugtakið við atliti at kríggj og frið. Hann vil vera við, at tann mest grundleggjandi náttúrurættarliga meginreglan er, at avtalur skulu haldast. Hetta er fortreytin fyri, at ein givin samfelagssáttmáli hevur bindandi mátt. Ein annar, ið eisini koma at hava stóran týdning fyri alt orðaskifti um náttúrurætt og mannarættindi, er týski upplýsingarheimspekingurin Immanuel Kant ( 1724 – 1804) (Jankowiak, 2024). Hansara íkast er ikki minst ein skipað og djúptøkin roynd at sannprógva nakrar objektivar, moralskar meginreglur.

Umframt omanfyri nevndu fortreytir eru nøkur søgulig viðurskifti, ið tað ikki ber til at koma uttan um. Inngangurin til amerikansku frælsisyvirlýsingina frá 1776 er júst ein yvirlýsing um mannarættindini. Kendastu orðini munnu vera hesi: " Vit meta hesar sannleikar at vera sjálvsagdar, at øll menniskju eru skapað líka, og at tey av skaparanum hava fingið ávís ómissandi rættindi, teirra millum rættin til lív, frælsi og stremban eftir eydnu" (U.S. National Archives, 2024).

Franska mannarættindayvirlýsingin frá 1789 kom somuleiðis at hava avgerandi týdning, fyrst í Frankaríki og síðani altjóða (National Archives, 2022). Nevnt verður trúarfrælsi, talu- og framsagnarfrælsi og rætturin til at taka lut í lóggávuvaldinum. Viðurskifti sum javnstøða fyri lógini, rættartrygd og rætturin at reisa seg upp í móti kúgan verða eisini nevnd. Somuleiðis at ognarrætturin er friðhalgaður.

Flyta vit okkum fram upp í nútíðina, so má mannarættindayvirlýsingin frá 1948 sigast at vera tað avgerandi vegamótið (United Nations, 2024). Her verða í 30 greinum staðfest tey grundleggjandi rættindini, ið nútímans mannarættindi

byggja á. Baksýni fyri Mannarættindayvirlýsingini var fyrst og fremst ræðuleikarnir undir 2. heimsbardaga. Síðani er nakrir sonevndir kjarnu-sáttmálar komnir afturat.

Umframt mannarættindayvirlýsingina, so hava evropeisk lond samtykt tann sonevnda evropeiska mannarættindasáttmálan (European Court, 2024). Hesin hevur sum endamál at tryggja tað rættarliga grundarlagið undir mannarættindunum. Um vit taka samanum, so er her beinrakið at skilja ímillum teosentriskt og antropomorfiskt grundað mannarættindi. Tann fyrra uppfatanin hevur kjølfestu í teismu, tann seinna í menniskjanum sjálvum. Vit kundu kanska eisini sagt náttúrurættur við ella uttan ein Gud.

## Mannarættindi í nútíðini

Mannarættindi hava í dag ein týðandi leiklut, bæði sum hugsjónaligt fyribrigdi og sum løgfrøðiligur veruleiki. Bæði í nationalari lóggávu og í millumtjóða sáttmálum verður tikið atlit til mannarættindayvirlýsingina og mannarættindahugsanina í stóran mun. Men tað merkir ikki, at tað ikki finnast avbjóðingar. Heimurin stendur ikki í stað, og tað ger uppfatanin av mannarættindum heldur ikki. Brot á mannarættindini er gerandiskostur, og atfinningar at mannarættindunum koma frá fleiri síðum. Ikki ber til her at fara út í æsir við við øllum hesum viðurskiftum, men víst skal verða á nøkur viðurskifti av prinsipiellum týdningi.

Sum mannarættindini eru lýst, ikki minst í mannarættindayvirlýsingini, so eru tey *universell* og *objektiv.* At tey eru universell merkir, at tey grundleggjandi eru galdandi fyri øll og undir øllum umstøðum (Nickl og Etinson, 2024) T.d. kann national lóggáva, ið ger seg inn á mannarættindini, ikki metast sum legitim. At tey eru objektiv merkir, at tey mugu metast sum normativar sannroyndir. At halda mannarættindini er tískil ikki eitt subjektivt val, men ein skylda. Men undir hesum uppáhaldum liggja djúptøknir heimspekiligir spurningar. Latið okkum taka tað universalistiska uppáhaldið fyrst. Kann ein bólkur av londum við eitt ávíst tíðarhvarv, t.d. 1948, orða eina yvirlýsing, sum bindur komandi tjóðir? Heimurin er nógv broyttur síðani tá. Nøkur núverandi lond vóru ikki als til tá, og valdsjavnin í heiminum var heilt øðrvísi. Ein afturvendandi atfinning frá ikki minst tí sonevnda triðja heiminum er, at mannarættindayvirlýsingin frá 1948 avspeglar eitt vesturlendskt perspektiv. Eitt í ringasta føri heimsveldis-perspektiv. Eitt slíkt perspektiv letst at umboða universell áhugamál, men er í roynd og veru bygt á eina vesturlendska heimsfatan (Mutua, 2001). T.d. verður ført fram, at mannafatanin er í stóran mun *individualistiskt,* og baktjaldið er virðini í amerikansku frælsisyvirlýsingini og fronsku mannarættinda-yvirlýsingini. Ein tílík tilgongd, verður sagt, leggur lítið lag í aðrar mentanir. Mentanir, har heildin hevur nógv størri vekt á vágskálini, og einstaklingurin samsvarandi minni. Í ringasta føri er hetta eitt slag av imperialismu og/ella etnosentrismu í rættlætisskikkju. Men sum eitt svar upp á hesa atfinning verður

m.a. ført fram, at vestanlond vóru í stórum minniluta, tá universella mannarættindayvirlýsingin hjá ST varð skrivað og samtykt (í Skorini, 2020).

Í slekt við tað universalistiska, men tó nakað øðrvísi, er spurningurin, um hvørt mannarættindasáttmálin kann sigast at byggja á objektiv virði. Hesin spurningur er ein av teimum mest grundleggjandi í tí partinum av heimspekiligu etikkini, ið nevnist metaetikk (DeLapp, 2024). Platon viðger í nøkrum av sínum dialogum henda spurning, og hann hevur ta uppfatan, at objektiv virði finnast. Tann stóra avbjóðingin er at finna fram til tey. Hann letur Sokrates bresta saman við ymiskar sofistar, ið umboða eina relativistiska virðisuppfatan (Duke, 2024). Einki endaligt úrslit spyrst burturúr hesum hólmgongum. Og spurningurin má enn í dag sigast at standa opin. Sum við so nógvum øðrum heimspekiligum spurningum, so tykjast tað vera góð argument á báðum síðum. Heimspekingar, ið siga, at virði er nakað vit *finna*, verða nevndir *realistar* við atliti til spurningin um hvørja ontologiska støðu virði hava. Heldur tú, at virði er nakað subjektivt, vit *uppfinna*, so er tú *antirealistur*.

## Grundgevingartilgongdir

Um vit nú fara aftur til spurningin, um hvat gildi mannarættindi hava, og møguliga kunnu ynskjast at hava, so kunnu nevnast í hvussu er tvær tilgongdir, ið byggja á tað omanfyristandandi.

Ein náttúrurættarlig tilgongd vil oftani so ella so royna at kjølfesta mannarættindini í náttúrurættarhugtakinum (Wenar, 2020). Um hetta skuldi eydnast, so er tann eyðsæddi fyrimunurin tann, at hetta verjir móti subjektiv-istiskum atfinningum. Ella sagt á annan hátt: Eru mannarættindini feld inn í tað verandi, og ikki bert subjektiv uppáhald, so slepst undan í tíð og ótíð at noyðast at rættvísgera tey. Tey kunnu førast aftur til ein normativan veruleika. Sum nevnt í byrjanini av greinini, hildu stoikararnir, at tað fanst ein heimsskipan, ið tryggjaði menniskjanum rættindi takkað veri tí at vera partur av mannaættini. Tó man vera ivasamt, hvønn sannførandi mátt stoisk heimsfatan hevur í nútíðini. T.d. kallaði Bentham (1748 -1832) náttúrurættin fyri "nonsense on stilts" (Sweet, 2024).

Ein annar møguleiki er at grundgeva átrúnaðarliga, sum t.d. Thomas Aquinas gjørdi. Trupulleikin við hesari strategiini er bert tann, at hon hevur sum fortreyt, at tú tekur undir við einari ávísari trúarskipan, t.d. tí katólsku hjá Aquinas. Tað verður neyvan lætt at sannføra eitt nú ein hinduist ella agnostikara við katólskari dogmatikk. Men hvat so við einari kantianskari strategi? Aðalmálið hjá Kant var at byggja ein etikk á menniskjuna sum skilvísa veru, sum júst takkað verið skilvísinum kundi vera sín egni lóggevi. Og takkað verið skilvísinum hevði menniskjan eisini tign. Tann etiski autoriteturin kemur her ikki uttanífrá, men er grundaður á menniskjuna sjálva sum júst skynsemisveru. Hesin framferðar-háttur er møguliga ikki uttan perspektivir. Men eisini her eru trupulleikar. Eftirtíðin hevur m.a. sett spurnartekn við nakrar av fortreytunum fyri tí

kantiansku pliktetikkini. Tó er her vert at nevna, at Kant í 1795 gevur eitt verk út, ið hann nevnir “Zum ewige Frieden” (Kant, 1795). Hetta er ein djúptøkin roynd at orða eitt rættarheimspekiligt grundarlag undir viðurskiftunum millum statir, ikki minst fyri at forða fyri kríggi.

Men um nú ein náttúrurættarlig tilgongd er trupul og lítið sannførandi, hvat er so til ráða at taka? Her er tað, at ein ella onnur kontraktteori kemur inn í myndina. Sum tað liggur í orðinum, so er málið gjøgnum samtykt at orða nakrar grundleggjandi reglur. Í mannarættindahøpi eru sjálvsagt reglur fyri, hvørji rættindi einstaklingar og bólkar hava krav uppá. Tann eyðsæddi fyrimunurin við einari kontraktteori er, at ikki er neyðugt grundgeva fyri henni metafysiskt ella religiøst. Tað, ið gevur sáttmálanum gildi er, at hann er undirskrivaður av avtalupørtunum. Ideelt sæð, so eru tað nøkur lond við legitimt valdum stjórnum, ið orða nakrar grundleggjandi normar. Londini kunnu í prinsippinum vera rættiliga ymisk, eisini við atliti til átrúna og uppfatanir av eitt nú støðuni hjá einstaklinginum. Tað, ið um ræður er, at man gjøgnum sáttmála bindur seg til at halda nakrar nærri ásettar spælireglur. Veikleikin við einari tílíkari skipan er, at hon í prinsippinum kann uppsigast nær tað skal vera. At man so kann byggja inn í skipanina nakrar mekanismur, ið gera eina uppsøgn trupla, er nakað annað. Umframt áðurnevnda trupulleika er so sjálvsagt eisini tað, at hon bert umfatar tey lond, ið hava skrivað undir. Avtalan verjir ikki onnur uttan sum fordømi.

Men nú er ikki vist, at skilnaðurin millum eina náttúrurættaliga tilgongd, og eina kontraktgrundaða tilgongd er so altavgerandi. Í staðin fyri at hyggja serliga at hesi tvístøðuni, ber eisini til at venda áhuganum móti mannarættindum í politiskum høpi. Her kunnu vit spyrja, hvussu mannarættindi virka sum politisk amboð, og hvussu gongdin er við atliti til altjóða politiska ávirkan. Ella sagt á annan hátt: Verða mannarættindi feld inn í bæði nationala og altjóða lóg og virka á tann hátt, so kunnu vit liva við einari meira akademiskari ósemju. Í hesum høpi eru hugsanirnar hjá amerikanska heimspekinginum John Rawls (1921-2002) áhugaverdar (Ivic, 2010). Hann brúkar hugtakið “ the overlapping consensus”. Í hesum liggur, at vit gerast ongantíð samd um alt. Men um okkurt er so ringt, at øll vilja sleppa undan hesum, og okkurt er so gott, at øll ynskja tað; ja so, so kunnu vit finna eina “umskarandi semju” t.e. eina semju, har mentanir og siðvenjur umskarast.

Franski heimspekingurin Jacques Maritain, ið var við til at orða heimsyvirlýsingina frá 1948, er inni á nøkrum av tí sama. Spurdur um grundarlagið fyri Universal Declaration of Human Rights svarar hann: “ Yes, we agree about the rights, but on condition that no one asks us why” (Theilen, 2021). Sagt við øðrum orðum: Vit kunnu semjast um ein lista av rættindum, men vit hava sera ymiskar filosofiskar ella átrúnaðarligar keldur at rættvísgera hesa skránna av rættindum.

## Hvørji rættindi skulu vera mannarættindi?

Tað sigur seg næstan sjálvt, at hugtakið mannarættindi í praksis kemur at vera ein partmongd av teimum samlaðu rættindunum hjá borgarunum. Og søguliga sæð er hugtakið mannarættindi brúkt um rættindi av grundleggjandi og kanska kunnu vit siga eksistentiellum slag. Millum hesi eru til dømis rætturin til lív, frælsi og persónliga trygd, eins og frælsi frá pínslu og mannminking.

Men tá hetta er sagt, er ikki full semja um, hvørji rættindi skulu fáa støðu sum mannarættindi. Tó ber til at siga, at tað eru tvær høvuðstøður við einum glíðandi skifti. Um vit byrja við tí, ið nevnt verður tann minimalistiska tilgongdin, so sigur henda, at bert heilt grundleggjandi, so sum omanfyri nevndu rættindi, kunnu koma upp á tal. Tað eru tað fleiri orsøkir til. Ført verður fram, at um ov nógv og minni fundamental rættindi koma við, er ein vandi fyri, at inflatión kemur í. Fylgjan av hesum verður, at hugtakið mannarættindi missur tign, og fara hesi við tíðini ikki at verða tikin í álvara. Tá geva vit meira fyri minni. Eisini er vandi fyri, at undirtøkan og viljin at seta mannarættindi í verk minkar. Í praksis merkir hetta t.d., at ymiskir ískoytissáttmálar als ikki fáa undirtøku. Virðiskonservativ lond fara at venda samarbeiðinum um mannarættindi bakið, um sonevnd vesturlendsk rættindi koma undir mannarættindahugtakið. Úr einum meira politiskum perspektivi, har høgra-vinstra ásin ger seg galdandi, er tað eisini viðkomandi at hava við, hvørs rættindi eru rættindi *frá* nøkrum, ella rættindi *til* nakað. Hesin munurin kann eisini býtast sundur í positiv og negativ rættindi. Positiv rættindi snúgva seg um alt tað, sum eg havi rætt til (t.d. talufrælsið, trúarfrælsið, reint vatn, skúlagongd o.s.fr.). Og negativ rættindi snúgva seg um tað, sum eg havi rætt til at sleppa undan (kúgan, mismuni, harðskapi o.s.fr.). Ein klassiskur liberalistur vildi sagt, at rættindi í stóran mun eiga at vera rætturin *frá* nøkrum. Rætturin frá órættvísari og tilvildarligari rættarsókn, rætturin frá uppíblanding í privatlívið, rætturin ikki at verða kúgaður o.s.fr. Og so eitt afturat. Hevur ein borgari *rætt t*il eitthvørt, so fylgir ein *skylda* frá samfelagsins síðu at uppfylla hesi rættindi. Við hesum fylgja útreiðslur til skattaborgaran. Hvønn rætt hevur samfelagið at áleggja honum hesar? Ein, ið viðger henda spurning djúptøkið í nýggjari tíð er tann kendi fortalarin fyri minimalstatinum, amerikanski heimspekingurin Robert Nozick (1938 – 2002) (Feser, 2024).

Síggja vit mannarættindaspurningar út frá muninum millum menningarlond og framkomin ídnaðarlond, so verður fylgjandi argument stundum ført fram: Um mannarættindini gerast ov umfatandi og eitt nú búskaparliga krevjandi, hava fátæk menningarlond ongan møguleika at uppfylla krøvini. Verður tað í praksis ógjørligt at uppfylla hesi, fara mannarættindini, um ein vil tað ella ei, at broyta støðu frá júst *rættindum* til at vera meira ella minni veruleikafjar *ideal.* Tað er sum so einki skeivt við idealum, men tey hava als ikki sama mátt sum rættarkrøv móti einum givnum stjórnarvaldi. Við øðrum orðum ber til at siga, at um mannarættindini gerast ov víðfevnd, fáa vit tað, ið á enskum verður nevnt "human right inflation". Tá er tað ein spurningur, um man ikki hevur givið meira fyri minni.

Flyta vit okkum móti einum meira umfatandi fyri ikki at siga maksimalistiskum mannarættindahugtaki, er argumentið, at fyri at liva eitt mannsømiligt lív er ikki nokk við fráveru av nøkrum ótespiligum viðurskiftum. Sjálvandi skulu mannarættindini verja einstaklingin móti yvirgangi so sum pínslu, hóttanum og aðrari mannminkan. Men hetta er ikki nokk. Mannarættindini eru sjálvandi ikki eitt mál í sær sjálvum, men eru til fyri at skapa fortreytir fyri einari mannsømiligari og vónandi blómandi tilveru. Fyri at taka eitt dømi, so er tað ikki nokk at hava t.d. rættartrygd og talu- og framsagnarfrælsi, um tú ikki hevur mat í munnin, atgongd til reint vatn og til grundleggjandi heilsutænastur. Við øðrum orðum skulu mannarættindini eisini tryggja rættin *til* nakað. Sjálvandi stinga nakrir avmarkingarspurningar seg upp her. Er atgongd til nøkulunda óheftar miðlar ein mannarættur? Ella hvat við alnótini? Er atgongdin til hana ein mannarættur? Men argumentið er, at sjálvt um avmarkingarspurningar stinga seg upp, er tað ikki ein forðing fyri einum meira víðfevndum mannarættindahugtaki. Skuldi man víst á ein heimspeking, ið vísir á at rættindi sum so mugu vera rættindi *til,* og ikki bara *frá,* er tað upplagt at vísa á áðurnevnda John Rawls (Richardson, 2024).

## Mannagongdir til at staðfesta hvat ið skal galda sum mannarættindi

Júst John Rawls gjørdist m.a. kendur fyri eitt uppskot til, hvussu til ber at finna fram til nakrar grundleggjandi normar í einum samfelagi. Hetta ger hann í verkinum "A Theory of Justice" frá 1971. Men háttalagið kann, kanska við smærri tillagingum, eisini brúkast, tá semja skal fáast um mannarættindi. Útgangspunktið hjá Rawls er ein hugaroynd, har vit skulu finna fram til nakrar grundleggjandi normar. Hann biður okkum hugsa okkum, at vit eru stødd aftanfyri eitt tám av óvitan. Vit vita ikki, hvørji vit eru við atliti at kyni, etniskum uppruna, sosialari og búskaparligari støðu o.s.fr. Vit kunnu so hugsa okkum eitt uppskot til eitt samfelag við teimum og teimum rættindunum. Vit skulu so spyrja, um vit sum rationellir aktørar kundu hugsað okkum at tikið undir við áðurnevnda samfelag, sæð frá teimum ymisku positiónunum. Kunnu vit svara játtandi, hevur hetta samfelagið við teimum givnu rættindunum staðið royndina. Myndin hjá Rawls kann brúkast til at fáa menniskju at hugsa um, hvussu tey høvdu skipað eitt samfelag, áðrenn tey vistu, hvussu tey sjálvi eru fødd (viðvíkjandi t.d. kyni, húðarliti, etniskum uppruna og trúgv). Hetta skal ikki fatast sum um, at allir smálutir skulu ígjøgnum hesa tilgongdina. Tað, ið tað snýr seg um, eru tey grundleggjandi virðini. Umframt hetta setur hann tvey onnur krøv. Fyri tað fyrsta er tað eitt krav, at mismunur kann undir ávísum umstøðum loyvast, men bert um hann gagnar teimum veikast stillaðu. Og fyri tað annað, so skulu almenn størv vera atkomulig fyri øll eftir førleika.

Spurningurin er so, um henda mannagongd er egnað, tá ið tað ræður um at knæseta mannarættindi í altjóða høpi. Uppskotið tykist í hvussu er áhugavert, men fortreytin fyri at tað er gjørligt í verki er sjálvandi, at allir luttakarar taka

undir við mannagongdini. Tað skal kanska ikki so nógv til fyri at spilla spælið. Um onkur frammanundan tilskilar sær eitt slag av vetorætti við atliti til nøkur ávís viðurskifti, so kann tykjast trupult at koma víðari.

## Ein kommunikativ tilgongd

Eitt annað uppskot, til hvussu vit koma ásamt um ein normativitet, kemur frá týska heimspekinginum Jügen Habermas (Finlayson og Ree, 2023) Uppskotið tykist eisini at vera viðkomandi, tá tosað verður um mannarættindi. Tilgongdin er í stuttum tann, at vit, myndarliga talað, sita um eitt runt borð. Hugsa vit um mannarættindi, er eitt altjóða forum upplagt. Ásannandi, at vit í einum nútímans heimi hava eitt margfeldi av virðum og virðisuppfatanum, og at ongin av hesum uppfatanum kann gera krav uppá at hava tann æviga sannleikan, er tann samskiftandi felagsskapurin krummtappurin. Men fyri at eitt slíkt samskifti skal geva meining og koma til nýtilig úrslit, er neyðugt at nakrar fortreytir eru uppfyltar. Fyri tað fyrsta, so skal tað bert vera *grundgevingarnar*, ið hava vekt. Hvørjum grundgevingarnar koma frá, er í prinsippinum óviðkomandi. T.v.s. at ongin vegna serstaka tign ella støðu kann gera krav upp á grundgevingarligan framíhjárætt. Samrøðan skal sostatt vera *harradømisfrí.* Og í øðrum lagi skulu luttakararnir í orðaskiftinum geva seg undir tað besta argumentið. Tí ber ikki til at siga, at tú hevur tað besta argumentið, men eg havi rætt. Tað besta argumentið hevur sína egnu sermerktu *fríu noyðslu*, sum tað verður nevnt. Við hesum fortreytum fer tann samskiftandi tilgongdin so í gongd. Men vert er at geva gætur, at hon í prinsippinum ongantíð endar. Komandi tíðir og komandi ættarlið koma við teirra royndum og fortreytum óivað til aðrar niðurstøður. Tað merkir, at tað er sera ósannlíkt, at vit koma fram til ævigar platonskar sannleikar. Men fyri tí at virðini, ið vit gjøgnum tilgongdina koma fram til, altíð er fyribils, eru tey ikki av tí orsøk virðisleys og uttan gildi. Heldur hinvegin eru tey vard ímóti at stirðna í kreddufesti.

Men er hetta uppskotið so gongd leið við atliti til mannarættindaspurningar? Ein afturvendandi atfinning er, at hetta er alt ov góðtrúgvið. Tí tá tað kemur til altjóða pallar, eru vit ikki stødd í siðaðum kjakfeløgum, men á politiskum vígvøllum, har tað snýr seg um vald og ávirkan. Tað vil siga, at har valda heilt aðrar spælireglur enn við tað runda samskiftisborðið. Skipanin er tískil viðbrekin, um ikki øll taka undir við meginreglunum og spæla við opnum kortum. Eru tað bert nakrir heilt fáir aktørar, ið ikki vilja spæla við, ella spæla við uppá kvamsvís, dettur skipanin sundur. Funnist hevur eisini verið at Habermas fyri at hava ov stórt og ógrundað álit á fornuftini og tí skilvísa menniskjanum. Kritikkarar peika stundum á David Hume (1711- 1776), ið vil vera við, at tað eru *kenslurnar,* sum seta málini, meðan vitið bert er amboðið at røkka teimum (Fieser, 2024). Men hvussu er og ikki, so tykist uppskotið hjá Habermas at hava havt ein viðkomandi leiklut í kjakinum. Alternativini til ein samskiftandi heim

eru neyvan heldur so hugalig. Vóru mannarættindini ikki til, høvdu tað verið áneyðir at uppfunnið tey, hevur onkur hildið fyri.

## Samanumtøka

Men spurningurin er sjálvandi, um áðurnevnda uppáhald er rætt. Sjálvandi ber til at ímynda sær ein heim, har tað valdar ein sonevnd hobbesiansk náttúrustøða. Hetta hugtak sipar til hugsanirnar hjá enska heimspekinginum Thomas Hobbes (Williams, 2024). Í verkinum "Leviathan" (Hobbes, 1651) ímyndar hann sær eina støðu, har menniskjan livir uttan nakran samfelagsligan normativitet. Einasta lóg, ið er galdandi, er frumskógarlógin, har øll stríðast ímóti øllum, og tey sterkastu yvirliva. Henda lóg er sum kunnugt lýsandi (deskriptiv) og ikki regluskipandi (preskriptiv). Menniskjan er undir hesum umstøðum frí og bert avmarkað av náttúrugivnum viðurskiftum. Men hinvegin er menniskjan verjuleys. Tað valdar rætt og slætt lógloysi (anomi). Og við tað, at homo sapiens eftir fatanini hjá Hobbes er ein boysin skapningur, gerst lívið "stutt og eirindaleyst". Men hon hevur eisini ein annan eginleika, og tað er førleikin at hugsa; hon er í ávísan mun vitborin. Og tað er júst hesin eginleikin, ið ger, at vit skipa okkum í samfeløg við tí fyri eyga at koma burtur úr tí eirindaleysu náttúrustøðuni. Hesi samfeløg, har Leviathan (statsvaldið latið í hold) valdar, eru sambært Hobbes als ikki nøkur fullkomin samfeløg. Friðurin, ið her valdar, var tað, ið Spinoza nevndi oyðimarkarfriðin, og er hann neyvan lystiligur. Men enn einaferð: Alternativið er verri.

Her skal leggjast afturat, at tað bert er innanhýsis í samfelagnum, at tað valdar eitt slag av regluskipan og lóg. Millum statir valdar frumskógarlógin við sama lag. Á donskum verður hetta eisini við einum ávísum fyrivarni nevnt *statsræson.* Við øðrum orðum valdar frumskógarlógin hóast heimsins lond seinastu øldina hava smíðað altjóða konventiónir, sum júst hava til endamáls at regulera statsliga atferð og avmarka stríð og kríggj.

Vit kunnu so spyrja, um ikki mannarættindi, ella í hvussu so er eitt minstamát av altjóða normum, eru nakað, ið vit kunnu ynskja okkum. Svarið tykist at vera eitt greitt ja. Ella orðað hypotetiskt: Ynskir tú eitt mannsømiligt lív, so eru mannarættindi ynskilig. Og ynskir tú mannarættindi fyri teg sjálva/n verður trupult at grundgeva fyri, at onnur ikki skulu njóta somu rættindi.

## Keldur

Archives Nationales (2022). The Declaration of the Rights of Man and of the Citizen. https://www.elysee.fr/en/french-presidency/the-declaration-of-the-rights-of-man-and-of-the-citizen (tikið niður 2024)

Brown, C. M. (2024). Thomas Aquinas. *Internet Encyclopedia of Philosophy*. https://iep.utm.edu/thomas-aquinas/ (tikið niður 2024)

DeLapp, K. M. (2024). Metaethics. *Internet Encyclopedia of Philosophy*. https://iep.utm.edu/metaethi/ (tikið niður 2024)

Duke, G. (2024). The Sophists. *Internet Encyclopedia of Philosophy*. https://iep.utm.edu/sophists/ (tikið niður 2024)

European Court of Human Rights, (2024). The European Convention on Human Rights. https://70.coe.int/pdf/convention_eng.pdf

Feser, E. (2024). Robert Nozick. *Internet Encyclopedia of Philosophy*. https://iep.utm.edu/nozick/ (tikið niður 2024)

Fieser, J. (2024). David Hume. *Internet Encyclopedia of Philosophy*.

Finlayson, J. G. & Ree, D. H. (2023). Jurgen Habermas. *Stanford Encyclopedia of Philosophy*. https://plato.stanford.edu/entries/habermas/

Hobbes, T. (1651). Leviathan. *Hackett Publishing*. https://iep.utm.edu/hume/ (tikið niður 2024)

Humpreys, J. (2024). Aristotle. *Internet Encyclopedia of Philosophy*. https://iep.utm.edu/aristotle/ (tikið niður 2024)

Ivic, S. (2010). Dynamic Nature of human rights. SciELO Scientific Electronic Library Online. https://www.scielo.br/j/trans/a/Tj5rR3cqKmV4wtkfXfzxq4p/

Jankowiak, T. (2024). Immanuel Kant. *Internet Encyclopedia of Philosophy*. https://iep.utm.edu/kantview/ (tikið niður 2024)

Kant, I. (1795). Zum Ewigen Frieden. Gutenberg. https://www.gutenberg.org/files/46873/46873-h/46873-h.htm

Miller, J. (2021). Hugo Grotius. *Stanford Encyclopedia of Philosophy*. https://plato.stanford.edu/entries/grotius/ (tikið niður 2024)

Mutua, wa M. (2001). Savages, Victims, and Saviors: The Metaphor of Human Rights". *Harvard International Law Journal, 42.* https://digitalcommons.law.buffalo.edu/journal_articles/570/

Nickl, J. & Etinson, A. (2024). Plato. *Stanford Encyclopedia of Philosophy*. https://plato.stanford.edu/entries/rights-human/

Pigliucci, M. (2024). Stoicism. *Internet Encyclopedia of Philosophy*. https://iep.utm.edu/stoicism/ (tikið niður 2024)

Richardson, H. S. (2024). John Rawls. *Internet Encyclopedia of Philosophy*. https://iep.utm.edu/rawls/ (tikið niður 2024)

Skorini, H. í (2020). *Free Speech, Religion and the United Nations: The Political Struggle to Define International Free Speech Norms*. Routledge University Press.

Sweet, W. (2024). Jeremy Bentham. *Internet Encyclopedia of Philosophy* https://iep.utm.edu/jeremy-bentham/ (tikið niður 2024)

Theilen, J. T. (2021). The Inflation of Human Rights: A Deconstruction. *Leiden Journal of International Law, 34*(4), pp. 831-854.

U.S. National Archives and Records Administration (2024). https://www.archives.gov/founding-docs/declaration-transcript (tikið niður 2024)

United Nations (2024). The Universal Declaration of Human Rights. https://www.un.org/en/about-us/universal-declaration-of-human-rights (tikið niður 2024)

Wenar, L. (2020). Rights. *Stanford Encyclopedia of Philosophy*. https://plato.stanford.edu/entries/rights/ (tikið niður 2024)

Williams, G. (2024). Thomas Hobbes. *Internet Encyclopedia of Philosophy*. Link: https://iep.utm.edu/hobmoral/ (Tikið niður 2024)